# Kunningarstovan flytur



**Miðvágur:** Eftir at hava hildið til í hølunum hjá Sandavágs Kommunu letur Vága Kunningarstova upp aftur 28. februar í hølunum, har Bónus hevur handil sín í Miðvági. Hetta er fjórðu ferð at Kunningarstovan flytur, skrivar Vágaportalurin. Inngongdin verður høvuðsinngongdin til bygningin, og við hesum fær Vága Kunningarstova eisini pláss til annað virksemi, sum ætlanin er at skipa fyri m.a. listaframsýningum og øðrum framsýningum.

# Fundur um børn við serligum tørvi

**Trongisvágur:** Stuðulsbólkurin fyri foreldur at børnum við serligum tørvi í Suðuroy varð stovnaður herfyri, og helt fund um viðurskiftini hjá serundirvísingini í fólkaskúlanum í gjárkvøldið í Trongisvágs skúla. Bólkurin legði á fundinum fram eitt upplegg um uppskotið at betra um serundirvísingina og umstøðurnar rundan um hana. Í tí sambandinum verða skúlastjórar og lærarar bodnir við til fundin, fyri at byrja ein dialog við skúlan. - Tí fara vit at heita á øll foreldur sum eiga børn við serligum tørvi, ið fáa serundirvísing, um at geva teirra íkast, sigur arbeiðsbólkurin við Suðurrás.



Walther Thomassen við skeribrennaranum. – Alt skal burtur, sigur hann

*"Høllin var nú so illa farin, og tí skal alt burtur*

*"Tað sum er eftir av tilfarinum skal slættast niður*

## Asfaltarbeiði er summararbeiði

**Veturin er ikki tíðin, tá føroysku vegirnir verða asfalteraðir. Tað arbeiðið verður einans gjørt um summarið.**

**Sum skilst á Waltheri er ætlanin at leggja til brots aftur við asfalteringini í apríl mánaði.**

**Í løtuni verða ymisk arbeiði gjørd á asfaltverkinum hjá Landsverki í Hundsáarbotni, og tá hesi eru liðug, verður klárt at fara undir at asfaltera kring landið.**

**Hetta asfaltverkið framleiddi okkurt árið 108.000 tons. Hetta var met. Árliga framleiðslan hevur ligið millum 70.000 - 90.000 tons árliga.**

**Kundarnir hjá asfaltverkinum eru umframt Landsverk, eisini kommunur og entreprenørar.**



*Smiðjan og knúsiverkið hava tænt fyri seg*



*Amboðini standa her enn, men tey skulu eisini beinast burtur*

Mynd: Landsverk